# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jóan Jakku Mortensen 80 ár



Mánadagin 29. august verður Jóan Jakku Mortensen í Havn 80 ár. Hann er ættaður úr Svínoy, har hann ofta vitjar, og stóra dagin eru hann og konan í Svínoy, har føðingardagurin verður hildin.

Foreldrini hjá Jóan Jakku vóru Anna Katrina, sum var úr Ovasta húsi í Svínoy, og Elisias, sum var ættaður úr Húsavík. Tey bæði fingu fimm børn - Hennelina, sum býr í Svínoy, Jóan Jakku, sum býr í Havnini, Jóhannes Alfred og Hans Jacob, sum búgva í Klaksvík, og Anna, sum búði í Norðdepli. Hon doyði fyri nøkrum árum síðani.

Elisias bygdi í Lágbø. Men Anna Katrina var nógv plágað at tuberklum, og hon var tískil nógv á Sanatorinum. Børnini vuksu fyri tað mesta upp í Ovasta húsi hjá mostrini Elisabeth. Undir krígnum hildu eingilsktmenninir, sum vóru í Svínoy, til í Lágbø. Fyri nú fleiri árum síðani keypti Jóan Jakku hesi húsini, og sum tann hegnismaður, ið hann er, so hevur hann sett tey í sera góðan stand.

Jóan Jakku, sum avgørt hoyrir til tey stillu í landinum, fór fyrstu ferð til skips í 1944, tá ið hann var á Norðfirðinum og róði út. Næstu árini sigldi hann eitt nú við Carlton hjá Jóan Jakku á Viðareiði og sum Esmar førdi, Atlansfarinum, sum Billu Jógvan førdi og átti saman við Kjølbro og Svínoyar Bjarna, sum svínoyingar áttu, og sum Hans Mellemgaard førdi.

1949-50 gekk Jóan Jakku upp á skúla í Klaksvík, og tá ið hann var liðugur á skúlanum, var hann eitt skifti bestimaður við Svínoynni, sum Jákup hjá Jensi førdi.

Í 1953 giftist Jóan Jakku við Annu Helenu í Gong úr Havn. Hon hevur eisini ættarbond til Svínoyar. Tey bygdu í Klokkaragøtu, og har búgva tey framvegis. Jóan Jakku gjørdist heimamaður, eftir at hann var fluttur til Havnar. Fyrru árini arbeiddi hann hjá svágrinum, Peturi í Gong, og síðani var hann sjálvstøðugur múrari. Í fleiri ár arbeiddi hann saman við einum øðrum svínoyingi í høvuðsstaðnum, Hanus Hansen ella Hanus hjá Amaliu, sum svínoygar nevndu hann. Teir báðir vóru leingi partur av býarmyndini í høvuðsstaðnum.

Tey í Ovasta húsi vóru musikalsk. Dreingirnir spældu eitt nú á harmoniku, og Jóan Jakku var í mong ár í sangkórinum í Ebenezer.

Anna Helena og Jóan Jakku eiga fimm børn - Helgi føddur í 1954 og Atli føddur í 1956 búgva í Havnini, Ragnar føddur í 1961 býr í Esbjerg, Elisabeth fødd í 1963 býr í Hoyvík, og Sóley fødd í 1966 býr í Noregi.

Abbabørnini eru tólv og langabbabørnini tvey.

## Andlát og jarðarferðir

**Else Kofod**, vanliga nevnd Elsa undir Varða, Tórshavn andaðist á Lágagarði týsdagin 23. august, 84 ára gomul.

Bønarhald verður á Lágargarði fríggjadagin klokkan 19.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 15.

Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Elsu, kunnu lata Lágargarði eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Emmely Forná**, Tórshavn andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 21. august, 74 ára gomul.

Bønarhald verður í Havnar kirkju fríggjadagin klokkan 18.

Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Emmely, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu. Konto í peningastovninum.

**Oddjó Brekká**, Hvalvík, ættað úr Tjørnuvík, andaðist í heiminum hósdagin, 63 ára gomul.

Farið verður úr heiminum leygakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju sunnudagin klokkan 15.

Kistan við **Elin Frederiksberg**, Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 13:30.

**Brian Vang** fer til gravar úr Ringe kirke leygardagin 27. august klokkan 11.00.

## Jógvan Høj 50 ár



Í dag, leygardagin 27. august, verður Jógvan Høj í Klaksvík hálvt hundrað. Hann hevur mest sum alla sína tíð búð í Klaksvík, og hann hevur arbeitt í flakavinnuni øll árini.

Jógvan er sonur Fíu og John Høj, sum búgva mitt í býnum. Tey eiga trý børn - Ebba býr í Havnini og Jógvan og Joan búgva í Klaksvík. Systrarnar eru báðar sjúkrasystrar.

Eftir lokna skúlagongd arbeiddi Jógvan eitt ár á Kósini. Í 1973 fór hann saman við einum vinmanni til Stavanger, har teir í eitt ár vóru á Norges Hermetik fakskole.

Tá ið Jógvan var komin aftur úr Noregi, keyptu hann og pápin flakavirkið í Árnafirði, Norðurfisk. Jógvan var stjóri nógvu tey fyrstu árini, og onkur skifti hevur hann verið virkisleiðari á Kósini. Í Árnafirði framleiddu teir fyrst og fremst raspað hýsufløk, og á Kósini var Jógvan nógv uppi í menning av nýggjum vørum.

Í 1997 keypti Jógvan flakavirkið í Nordepli. Tey fyrstu árini átti hann tað saman við spaniumonnum, og virkið arbeiddi saltfisk burturav. Seinni keypti Jógvan partin hjá spaniólunum, og virkið, sum eitur Norðfra, varð bygt um til vanligt flakavirki.

Flakavirkið í Norðdepli er størsta arbeiðsplássið í kommununi, og arbeiðsfólkunum hevur dámt væl, og tey hava verið rættuliga støðug á virkinum. Tey seinnu árini hava tey lagt alt størri dent á at framleiða til heimamarknaðin. Fiskasuppan er sera væl umtókt, og tey selja eisini so nógvan annan døgurðamat. Eitt nú ræstan fisk, kjálkar, lippur og raspað flak. Hetta verður selt um alt landið.

John Høj var í meiri enn ein mansaldur sunnudagsskúlalærari í Betesda, og Jógvan hevur eisini í hesum gingið í faðirsins fótasporum. Jógvan er eisini ógvuliga áhugaður í sangi. Hann hevur sungið í Betesda kórinum síðani 1970, hann hevur sungið við Seytjan sangarum øll árini, sum hetta kórið hevur verið til, og so er hann við í kvartettini Vitin.

At Jógvan er trúfastur boðar alt hansara lív og virki frá. Hann er rólógur og hóvligur maður, men tað merkir ikki, at hann ikki hevur sínar meiningar, og hann dugir væl at tala fyri teimum. Jógvan er giftur við Sonju, fødd Hammer, og ættað úr Klaksvík. Tey búgva undir Fossum, og tey eiga trý børn - Ester fødd í 1979, Fía fødd í 1983 og Jákup sum er føddur í 1988. Ester og maður hennara Allan Eysturskarð, sum er ættaður úr Fuglafirði, arbeiða bæði á virkinum í Norðdepli.

Føðingardagurin hjá Jógvani Høj verður hildin í matarhøllini í Norðfra.

## Dagurin

**27. august.Gebhardus,** deyður í 995. Biskupur í Konstanz í Týsklandi, liggur grivin í kleysturkirkjuni har, sum hann sjálvur sigst at hava latið byggja.

**28. august. Augustinus,** deyður ár 430. Føddur í Tagaste í Norðurafrika. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði biskupur í Hippo í Norðurafriku. Hann doyði tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kiskjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði.

Navnið Augustus er latínskt og merkir *hin hátt upphevjaði.*

**29. august. Jóhannes hálshøgdur.** Dagurin hildin til minnis um at Heródes læt Jóhannes Doyparan hálshøgga.

*Samveldissáttmáli varð gjørdur í Bergen millum Noreg og Danmark hendan dagin í 1450.*

## 75 ár

Mánadagin 29. august verður Petur Midjord, Fuglafjørður, 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.